# Sáttmála semja

**Trætumál á arbeiðsmarknaðinum verða eftir ætlan í framtíðini loyst sambært sáttmála um fastan gerðarrætt**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR

*Heri á Rógvi*

*heri@sosialurin.fo*







Nevnd við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum arbeiðir í løtuni við at skipa betri karmar um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðið hevur til endamáls fáa í lag ein stovn, sum kann taka sær av trætumálum og ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Í fyrsta lagi fæst nevndin við at evna til skipan við føstum gerðarrætti, ið skal loysa trætumál og tulkingarspurningar í sáttmála-tíðini. Í øðrum lagi við at endurskoða skipanina við semingsmonnum, sum tekur sær av áhugaósemjum, tá sáttmálaskeiðini ganga út.

– Vit eru komin ásamt um at mæla til sáttmála um nýggja avtalaða stovnin fasta gerðarrætt, sum skal fara til verka, tá allir partar eru samdir og hava skrivað undir. Hesin nýggi stovnur skal virka óheft av pørtunum og politiska myndugleikanum, sigur Kári á Rógvi.

Talan verður tískil ikki um løgtingslóg, sum ásetir ein arbeiðsmarknaðardómstól ella annan tvungnan almennan stovn. Men heldur sáttmála millum partanna á arbeiðsmarknaðinum.

– Tað verða løgfrøðingar og sakkøn fólk, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum vísa á, sum fara at mynda stovnin og skulu taka støður til trætumál á arbeiðsmarknaðinum, sigur Kári á Rógvi.

## Einki stórt lógarverk

Løgtingið skal eftir ætlandi bert samtykkja lóg, sum heimilar almennum stovnum at samstarva við henda stovn, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir ráða fyri.

– Á henda hátt kunnu almennir stovnar veita gerðarættinum skrivstovuhjálp og stuðla, sigur Kári á Rógvi.

Seinni í summar ella tíðliga í heyst fara feløgini at fáa tilmælini til hoyringar. Feløgini verða kunnaði um arbeiðið hjá nevndini umvegis umboð síni.

Tað er rættiliga drúgt arbeiði at gera tílíkan stovn. Tí allir partar skulu vera samdir, áðrenn sáttmálin og harvið fasti gerðarættur kunnu setast á stovn.

Knapt seksti feløg og stovnar skulu verða samdir og skriva undir sáttmálan. Tað er eftir ætlan ikki fyrr enn øll kunnu taka undir við sáttmálanum, at hann fer at virka. Talan er um arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløg, eisini landið sum arbeiðsgevara og kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Tað er Bjarni Djurholm landsstýrismaður í vinnumálum, ið hevur sett nevndina.

## Ingeborg kann einki gera

Hon plagar ikki at siga so lítið. Men forkvinnan í Føroya arbeiðarafelag vil ikki gera viðmerkingar til tey nógvu rósandi orðini til Bárð Nielsen, landsstýrismann, frá formanninum í Havnar arbeiðsmannafelag, Hans Joensen. Eiheldur vil hon gera viðmerkingar til, um hon heldur tað vera rætt, at maskinmeistararnir samráddu seg til eina størri lønarhækkan enn arbeiðarafeløgini fingu fyrr í ár

– Eg ætli mær ikki út í eina diskussión um hatta, sigur hon.

Føroya arbeiðarafelag heldur sum útgangsstøði, at tað ikki er heppið, at løgtingið løggevur á slíkan hátt sum mikudagin. Men aðrar viðmerkingar enn tað, hevur forkvinnan í størsta arbeiðarafelagnum ikki.

– Vit hava gjørt ein sáttmála. Tað er tann veruleiki, vit mugu halda okkum til. Vit fáa ikki gjørt annað, sigur Ingeborg Vinther.

**HR**

# Sigldi á stuttleikabát

**Ein svenskur bátur varð ásigldur á Tvøroyri, meðan hann lá við bryggju**

ÓHAPP

*Heri á Rógvi*

*heri@sosialurin.fo*

Ein svii fekk eina heldur keðiliga uppliving sunnudagin.

Báturin, ið hann sjálvur hevur smíðað og siglt til Føroya, varð ásigldur tá hesin lá við bryggju á Tvøroyri. Hann hevur verið á ferð kring oyggjarnar og hevði ætlað sær til Hetlands mánadagin.

Talan er um 34 fót bátin Magnum Bonum, sum er bygdur í 1981. Hann lá við bryggju, tá línubáturin Kúrberg stevndi inn móti bryggju. Meðan eigarin av Magnum Bonum fylgdi við, rendi Kúrberg inn á stýrisborðsíðuna á snotuliga svenska bátinum.

Løgreglan á Tvøroyri upplýsir, at talan var um eitt hendiligt óhapp. Skiparin á Kúrberg fekk ikki stýrt bátinum og kom at bakka á svenska stuttleikabátin.

Í skrivandi stund fær sviin ikki siglt víðari.




*Magnun Borum fekk harða viðferð á Tvøroyri*

*Mynd: Leivur Nygaard*

Àbøtur skulu gerast á Magnum Bonum, áðrenn hesin fær siglt víðari.

## Stak friðarligt

Hóast Fjarðastevna varð hildin og summar og gott lag er á fólki, so hevur tað ikki verið nógv at gjørt hjá løgregluni kring landið.

Vakthavandi í støðini í Runavík sigur, at tað var stak friðarligt alt vikuskiftið, og somu boð ljóða eisini frá vakthavandi í Havn.

– Tað vóru bæði nógv fólk og nógvir bilar á Skála, men øll skikkaðu sær øgiliga væl, verður upplýst av Politi støðini í Runavík.

Heldur ikki í Klaksvík er nakað at skriva heim um, upplýsir vakthavandi.

Nakrir fáir menn hava sovið rúsin av sær í Havn.

Ein maður varð tikin fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka í Eysturoynni kl. 1 sunnumorgunin.

Leygarmorgunin varð eisini ein maður tikin fyri rúsdrekkakoyring av løgregluni í Havn.

Hesir verða nú báðir skuldsettir og skulu møta fyri einum dómara.